# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Tvey norðurlond í HM-undankapping

**Í HM-undankappingini, ið føroyska hondbóltslandsliðið hjá monnum luttekur í, er eitt annað norðurland. Talan er um Finland, sum eru í bólki 5. Føroyar eru í bólki 7**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

HM-undankappingin er deild í sjey bólkar, og trý lið eru í hvørjum bólki. Vinnarin av hvørjum bólki er við í einum lutakasti, ið verður hildið í Noregi í sambandi við at EM-endaspælið er í Lillehammer. Lutakastið verður 27. januar í Håkons Arena í Lillehammer, og tá fær man at vita, hvør skal møta hvørjum í "Play-offs" dystunum. Endaligi vinnarin sleppur við til HM-endaspælið, ið verður í Zagreb í Kroatia í 2009.

## Eittans annað norðurland

Bert eitt annað norðurland er við í HM-undankappingini, og tað er Finland. Eisini teir hava eitt land, ið er fyrrverandi partur av gamla Jugoslavia. Talan er um Bosnia Herzegovina, og í okkara bólki, Serbia.

Um vit taka Finland fyrst, so hava teir, eins og Føroyar, spælt tríggjar dystir, og har hava teir vunnið ein og tapt tveir. Lítil munur er annars á liðunum, tí fyrsta dystin vann Finland á útivølli móti Litava, 30-29, meðan næsti dystur móti sami tjóð var taptur 33-32. Triðja dystin taptu teir móti Bosnia Herzegovina, 29-28, so eftir tríggjar dystir hevur Finland ein málmun, ið sigur minus eitt. Hjá føroyingum er talan um minni vøkur tøl. Eftir teir tríggjar dystirnar hava Føroyar ein málmun, ið sigur minus 33.

## Føroyingar fáa dyggan stuðul

Stuttligt er at síggja at føroyingar eru sera væl stuðlaðir. Av teimum 21 tjóðunum í HM-undankappingini eru Føroyar nummar seks á listanum yvir best stuðlaðu, um man hyggur eftir áskoðaratalinum. Til dystin á Hálsi vóru 800 fólk uppmøtt at stuðla, meðan Holland er á odda á hesum lista, við 1500 áskoðarum. Hetta tá teir tóku móti Turkalandi á heimavølli.

## Heimligur hondbóltur

Meðan okkara manslandslið er í HM-undankapping, eru kvinnurnar so smátt byrjaðar aftur eftir jólasteðgin. Ein dystur var mikukvøldið, tá VB tóku móti StÍF í Vági, og Vágskvinnur hildu trýstið á Neista kvinnurnar, við at vinna 25-20, eftir hálvleiksstøðuna 15-9.



*Føroyingar hava verið óførir at stuðla manslandsliðið okkara í hondbólti, sum í hesum døgum er í HM-undankapping. Her síggjast áskoðarar stuðla liðnum móti Ísrael í høllini á Hálsi*

## Profilarnir avgjørdu

Sum ikki einaferð, vóru tað Daiva Toumaite og Laila Jespersen, ið vístu vegin, tá VB-kvinnurnar tóku stigini í heimadystinum móti StÍF. Eisini Svava Vestergaard hevur víst seg at vera ein dyggur stuðulsleikari hjá VB. Hon hevur við sínum ótrúliga arbeiðsinnsatsi verið við til at givið hinum á VB-liðnum meira pláss og lættari spæl. Svava er heilt víst ein spælari, ið vit koma at síggja nógv til framyvir.

Um vikuskiftið verður eittans hondbóltsdystur hjá kvinnunum, og tað verður aftur í Vági, og hesaferð er tað oddaliðið Stjørnan, ið kemur á vitjan. So spennandi verður at síggja, hvussu leikur fer, tá tvær tær bestu útlendsku ískotini í kvinnudeildini møtast í dysti vestiri á Eiðinum. Talan er sjálvsagt um Daivu Toumaite (VB) og Simona Petersen (Fyrr Dziugyte (Stjørnan)).

## Flogbólturin í gongd aftur

Hjá monnunum er talan um bert tann eina dystin í Meistaradeildini, og tað er í Havn, har Fleyr tekur ímóti oddaliðnum SÍ, ið fyri stuttari tíð síðan vann sær sess í steypafinaluni.

Á kvinnusíðuni eru væl fleiri dystir. Og millum annað kann nevnast at oddaliðið SÍ tekur móti Fleyr, heima í Sørvági, meðan tættastu kappingarneytarnir úr Fuglafirði eisini spæla í Vágum, t.e. móti hinum vágaliðnum Drátti. So spennandi verður at síggja, hvussu liðini eru fyri, eftir steðgin, og eftir Mjølnirkappingina.

## FAKTA

Dystir um vikuskiftið

Hondbóltur:
***Sunset-kappingin*:**

| **Dagur**: | **Klokkan**: | **Dystir**: |
|---|---|---|
| 13.01 | 15:00 | VB-Stjørnan |

Flogbóltur:
***Meistaradeild kvinnur*:**

| **Dagur**: | **Klokkan**: | **Dystir**: |
|---|---|---|
| 12.01 | 14:00 | Drátrur-ÍF |
| 13.01 | 14:00 | KÍF-TB |
| 13.01 | 14:00 | SÍ-Fleyr |

***Meistaradeild menn*:**

| **Dagur**: | **Klokkan**: | **Dystir**: |
|---|---|---|
| 12.01 | 16:00 | Fleyr-SÍ |

## FAKTA

HM-undankapping

***Bólkur 5*:**

| **LIÐ** | **D V J T** | **Mál** | **+/-** | **Stig** |
|---|---|---|---|---|
| 1. BIH Bosnia Herzegovina | 1 1 0 0 | 29:28 | 1 | 2 |
| 2. LTU Litava | 2 1 0 0 | 62:62 | 0 | 2 |
| 3. FIN Finland | 3 1 0 2 | 90:91 | -1 | 2 |

***Bólkur 7*:**

| **LIÐ** | **D V J T** | **Mál** | **+/-** | **Stig** |
|---|---|---|---|---|
| 1. SRB Serbia | 2 2 0 0 | 80:52 | 28 | 4 |
| 2. ISR Ísrael | 1 1 0 0 | 26:21 | 5 | 2 |
| 3. FAR Føroyar | 3 0 0 3 | 73:106 | -33 | 0 |